Formansfrágreiðingin
til aðalfundin 21. mars 2009

## Inngangur

Komandi aðalfundur er Starvsmannafelagsins 48.
Hetta er fyrsti aðalfundur, eg skal halda eina formans/kvinnufrágreiðing.Skjótt gongur tíðin. Longu eitt ár farið aftur um bak síðani aðalfundin á altjóða kvinnudegnum í fjør og hevur hetta verið eitt hendingarríkt og avbjóðandi ár. Hesin aðalfundurin er m.a. sermerktur á tann hátt, at onki nevndarval er. Broytingin, ið varð samtykt í 2007, at nevndarlimir verða valdir fyri trý ár í senn og formaðurin ella forkvinna fyri fýra ár inniber, at tað verða aðalfundir, tá onki nevndarval er á skránni og hesin er so tann fyrsti.
Vit hava valt at hava eitt tema á hesum aðalfundinum, og er hetta búskaparliga støðan og tær avbjóðingarnar, hon hevur við sær.
Okkara fíggjarmálaráðharri, Jóanes Ejdesgaard, verður annar av tveimum fyrilesarum og hin er Guðrun Sveinsdóttir, ið starvast hjá SFR, íslendska systurfelagi okkara.
Vit hava eitt gott samstarv við SFR, og hetta samstarvið inniber, at samskiftið er tætt og tí lætt at heita á tey. Nevndin metir tað hava áhuga fyri limir okkara at fáa eitt nærri innlit í støðuna hjá brøðratjóð okkara, og hvussu fakfeløgini arbeiða undir truplu fíggjarligu støðuni í Ísland.
Vit bjóða teimum báðum vælkomnum á okkara aðalfund og eru spent at hoyrar teirra fyrilestrar og vænta at fáa ein kunnleika og eitt innlit, vit sjálvi kunnu gagnnýta.

**Almenna viðmerkingar**
**og politiska støðan**

Farna árið, hevur verið sermerkt á so mangan hátt. Tað byrjaði við einum vali, hvørs úrslit innibar, at stórsta tal av kvinnum nakrantíð vórðu valdar á ting og síðani eisini í landsstýrissessirnar. Hetta javnari kynsbýti er ein neyðug og gleðilig gongd, ið eisini birtir vón um, at vit nú fáa eitt býti, vit kunnu vera errin av. Eisini kommunuvalið, tá 2008 fór at halla, vísti, at vit eru á rættari leið.
Á politiska pallinum hevði ein nýggja samgonga sæð dagsins ljós. CHE samgongan sat bert til septembur mánaða, tá innanhýsis ósemjur settu so stórar kílar í samstarvið, at hon skrædnaði. Vit vóru spent at síggja hvussu raðfestingarnar fóru at mynda seg hjá hesi samgongu, men stokkut var løtan. Tveir vinstrahallir flokkar og ein á miðjuni, skuldu, alt annað líka, verið við til at ment samhaldsfestið og tey virði, ið hava fingið heitið “bleyt”. Samgonguni var bert lív laga í nakrar mánaðir og í septembur varð CHE aftur ABC.
Tær raðfestingar vit hava sæð, síðani nýggja fíggjarlógin varð samtykt og nú vísir sítt andlit, eru syrgiligar. Tey øki, ið verða rakt av skerjingum eru tey, ið eiga at grundfesta okkum sum eitt samfelag, ið er fyri øll. Eitt samfelag, ið tekur sær av teimum, ið onkursvegna hava verið við skerdan lut. Her verður skarvað av, vit harmast slíkar prioriteringar. Og vit góðtaka als ikki hesa framferð. Og at skerjingar verða framdar uttan at tey, tær raka, eru tikin við uppá mál og hoyrd, tað eigur ikki at henda í einum framkomnum samfelagi.
Hugburðurin at útbúgving ikki er íløga/skerjingarnar á útbúgvingarøkinum eru óskiljandi. Um vit ætla at menna okkum sum tjóð, so er grundarsteinurin undir framburði vitan. Lítið nyttar fínt og framkomið tunnilskervið, um fólkið og vitanin rýma úr landinum ella aftra seg at koma heimaftur, vegna raðfestingar, ið tey ikki vilja kennast við. Landsins myndugleiki eigur tann lut samvitskufult at skulu tæna landsins borgarum. Hetta er eitt stórt álit, vit hava litið teimum til, og tí hava vit sjálvsagt eina væntan og vón um, at tey leggja doyðin á at raðfesta virðiliga, skynsamt og framskygt og at solidariteturin er í hásæti.

Árið hevur eisini verið merkt av rembingum úti í heimi. Heimskreppan hevur prógvað, at eiga fríu marknaðarkreftirnar frítt spæl, er fólkið taparin. Stóru skuldarbyrðarnar skifta eigarar og skattgjaldarin stendur við rokningini.
Sligið er fast við 7" seymi, at eftirlit og stýring er alneyðug, og eigur hetta at vera óneyðugt at bera uppá mál.
Vónin er at búskaparstøðan broytist skjótt, og at tann óvissan og ótryggleikin, sum eru í kjalarvørri hennara steðgar.
Støðan hevur vónandi lært okkum at hugsa skynsamt, um tað vit gera íløgur í og at trøini ikki vaksa inn í himmalin.
Gamalt var at seta tering eftir nering, og tann háttur okkara forfedrar livdu, hann heldur enn.

**Einskiljingar og almenn partafeløg**
Nú kreppan hevur víst sítt dapra andlit manga staðni, so kunnu vit sanna, at einskiljing er ikki nakað gandaorð.
Hvussu hevði støðan verið, um Atlantic var endað á privatum hondum fult og heilt?
Og so felagið, ið keypt hevði fór at ridla fíggjarliga... Ja, vit kunnu bara hugsa okkum scenariið. Siti í flogfarinum, meðan eg skriv júst hetta brotið, og kann flúgva niður ein mikumorgun á fund og so heimaftur kvøldið eftir. Ikki er torført at ímynda sær, at farleiðin heim til Føroya hevði verið nógv skorin, um eitt privat felag skuldi gjørt raðfestingar og repa seglini. Og hetta hevði verið eitt stórt afturstig fyri okkara land í miðjum Atlantshavi.

Bæði Føroya Tele og Postverk Føroya eru almenn partafeløg.

Vit vita, at Postverkið er í tungum sjógvi. Tað skal rekast á privatum grundarlagi, tað merkist og merkist væl.
Starvsfólkið á Postverkinum koma út í hvønn krók í landinum og er hetta ein lívsæðr í samfelagnum. Ein politisk avgerð var at leggja Postverkið í alment partafelag, men hetta er ein sera ivasom avgerð og eftir felagsins tykki ikki røtt avgerð. Vit hava merkt, hvussu tað hevur rakt Postverkið sum arbeiðspláss. Umleggingar og rationaliseringar skapa órógv og hava viðført at fólk eru farin av stovninum.
At vita at fíggjarstøðan er trupul, ger at starvsfólkið óttast framtíðina. Rationaliseringar merkja oftast lækkandi tænastustøðið og skerjingar í starvsfólkahópinum. Tær avleiddu avleiðingarnar, um fólk gerast arbeiðsleys kunnu kosta samfelagnum munandi meira enn at fjálga um og fyribyrgja hesi gongd.
Sjálvsagt siga vit ikki, at ein fyritøka ella ein stovnur ikki skal hugsa um raksturin, men at kappast á privata marknaðinum, um tænastan er ein landstænasta, tað skurrar í okkara oyrum, og úrslitið verður hareftir.
Búskaparkreppan prógvar eisini, at tað er alneyðugt at kapitalurin ikki má fáa frítt spæl.
Tað er eisini eitt krav frá okkara síðu, at starvsfólk, sum hava røkt hesi størvini undan privatiseringsavgerðini, verða viðfarin virðiliga og væl og ikki missa síni rættindi.
Vit hava heitt á myndugleikarnar at tryggja, at fyrisitingarlógin skal vera galdandi í almennu partafeløgunum, sum vit meta er ein sjálvfylgja. Starvsfólkini hava mist hesa trygd, og tað kann ikki vera rætt, at tey, ið framvegis starvast á arbeiðsplássum landið varar av, missa síni rættindi. Hetta KANN tann politiski myndugleikin tryggja, bert vilji og skil eru til staðar. Higartil hevur hetta haltað í ólukkumáta, men vit fara tó aftur at heita á avgerðarmyndugleikan at fáa hesi viðurskiftir broytt sum skjótast. At starvsfólk skulu gerast taparar í hesum privatiseringsherðindunum hjá myndugleikunum kann als ikki góðtakast.

Lat tað beinanvegin vera greitt, at Starvsmannafelagið tekur ikki treytaleyst undir við einskiljingum. Fyrst og fremst hugsað vit her um alt tað, sum kemur undir eina tænastuskyldu til allar borgarar landsins. Hetta kann og má ikki enda á privatum hondum, tí sjálvandi vil tann privati fyrst og fremst hava eitt avkast til sín sjálvan og stórur vandi er tá fyri, at sjálv tænastan kemur í aðru røð. Stóri vandin er, at vit kunnun missa burtur samhaldafasta samfelagið, sum er grundstøðið undir einum góðum og tryggum samfelagi fyri øll. Og hetta vilja vit framhaldandi berjast fyri.

**Kringvarpið**

Í desembur mánaði í fjør fingu sjey av limum okkara, ið hava starvast í Kringvarpinum í mong ár - og summi ein mansaldur, hoyringsskriv um uppsøgn. Orsøkin skuldi eitast at vera sparingar.
Bæði starvsfólkini sjálvi, álitisfólkini og vit sum felag hava hvassliga átalað mannagongdini í hesum máli, ið als ikki hevur verið røtt og sømulig.
Í fyrsta lagi er sparingin eitt eiti, sum vit hava ført fram fleiri ferðir, at var vilji til tess, so var lætt at fremja hesa sparing við m.a. at brúka ásetingarnar í sáttmálanum um niðursetta tíð og eldrapolitikkin.
Og at seta nýggj starvsfólk, meðan ætlanin er at siga øðrum upp, er at taka grundarlagið undan grundgevingunum um sparingar og er so nirðandi háttur at fara við fólki, umframt at bæði sáttmálaásetingar og almenni setanarpolitikkurin eru brotin.
Eru grundgevingar fyri sparingum reellar, mugu vit sum fakfelag góðtaka hesar, tó gera alt fyri at fyribyrgja uppsagnum og annars tryggja limum okkara so góðar uppsagnartreytir sum tilber.
Men eru tær ikki reellar og starvsfólkini ikki fáa eina virðiliga viðferð, kunnu vit ikki tigandi hyggja at. Tað er syrgiligt, at vilji ikki hevur verið at loyst málið og samstundis eisini hugstoytt fyri okkum at uppliva, at annað felag royndi at nýta hesa støðu at heita á limir okkara, ið starvast í Kringvarpinum, at melda seg úr okkara felag og inn í teirra.
Nógv orka hevur verið nýtt frá okkara síðu at royna at fáa leiðslu Kringvarpsins at taka aftur hoyringsskrivini, men uttan úrslit og tað eru vit sera hørm um.
Tað er ongin ynskilig støða, at skula stríðast og ikki fáa loyst málið á ein virðiligan hátt. Sjálvsagt góðtaka vit ikki uppsagnirnar og hava tí kært bæði grundgevingarnar og handfaringina.
Advokatar okkara høvdu biðið um fleiri upplýsingar, í góðari tíð áðrenn hoyringsfreistin var úti, men hetta var ikki eftirlíkað, og er hetta óhoyrt.
Tær persónligu viðmerkingarnar limir okkara høvdu til hoyringsskrivini, blivu heldur ikki tikin í álvara. Øll móttóku sama uppsagnarskriv við júst sama orðaljóði og ongin fekk svar uppá teirra viðmerkingar, og kenna tey tað ikki sørt niðrandi.
Kæruvegleiðingin var eisini løgin. Leiðslan segði Mentamálarráðið, og Mentamálaráði segði at Kringvarpsstýrið skuldi viðgera møguliga kæru.
Endin var, at kæran skuldi sendast til Mentamálaráðið og málið verður viðgjørt í løtuni.
Vit hava vón um, at avgerðin verður umstoytt, tí grundgevingarnar og mannagongdirnar halda ikki. Og tey eiga rættin at fáa eina virðiliga og reella viðferð.

**Postverkið**

Sigast má, at tað hevur verið eitt avbjoðandi uppgáva Starvsmannafelgið hevur yvirtikið frá Postfelagnum.
Ultimo mars 2008 undirskrivaðu vit sáttmálan við FAG um starvsfólkini á Postverki Føroya.
Sjálvur sáttmálin líkist nú nógv hinum sáttmálanum vit hava viðvíkjandi Føroya Tele, hinum almenna partafelagnum vit hava sáttmála viðvíkjandi.

Lønarhækkingin var 8,3 % í 2 ár og 3 mánaðir og tískil eitt betri úrslit, enn hini samráðingarúrslitini.
Blekkið var tó valla turt, tá trupulleikar stungu seg upp.
Ein útberingarskipan, varð sett í verk her í Havnini, sum ongin hevði fingið kunning um tíansheldur ikki verið við at skipa, og er hetta beinleiðis í stríð við sáttmálaásetingarnar.
Nógv órógv og væntandi samstarv millum leiðslu og trímannanevnd hevur tikið alt ov nógva orku og tað kostar arbeiðsgleði og skapar ótryggleika millum starvsfólkini.
Vit og FAG hava havt eitt gott samstarv og fyri at broyta hesa drenandi støðu, avgjørdu vit at heita á hjálp frá serfrøðingi uttanhýsis at arbeiða við at skapa eitt grundarlag fyri einum berandi samskrifti og samstarvi millum leiðaslu og starvsfólk.
Hetta hevur gagnað, og er støðan nú betrað so partarnir nú kunnu viðgera neyðug mál á virðiligari hátt. Vit vóna at hetta er grundarlagið undir framhaldandi samstarvi.

Klaksvíkar kommuna
Eisini limir okkara hjá Klaksvíkar kommunu blivu rakt av spariknívinum í vetur.
Fíggjarstøðan hjá kommununi var trupul og eitt stórt hall í tvey ár, ið ikki átti at verið gjørligt hjá eini kommunu at havt, viðførdi at starvsfólkini máttu svíða.
Fólk vórðu sett niður í arbeiðstíð og eisini fingu tvey uppsagnarskriv.
Hetta vísir enn einaferð, at alneyðugt er at hava eftirlit og stýring við fíggjarstøðuni í landinum. At starvsfólkini skulu gjalda fyri førdan politikk, er als ikki rímuligt og hetta hava vit eisini borið skrivliga fram fyri kommununi.

**Tórshavnar kommuna**
Tað var gleðiligt at vera vitni til, at rætturin at sleppa til lækna í arbeiðstíðini, nú aftur er ein rættur starvsfólkini hjá Tórshavnar kommunu eiga.
Hesi rættindi og rætturin at fylgja uttan at verða trekt í løn, blivu strikað fyri nøkrum árum síðani.
Starvsfólkini vóru sera vónbrotin, at hesin rættindi, ið høvdu verið galdandi í áravís og ongantíð høvdu verið ein trupulleiki, bráðliga skuldi eitast at vera tað. Og leiðslan valdi tá at skera yvir ein kamb og uppsiga alt, heldur enn kanna eftir, um hetta var ein trupulleiki og so loysa hann, um so var.
At fara til lækna í arbeiðstíð var bert nýtt, tá á stóð og serliga so starvsfólk skuldu vera før fyri at útinna sítt starv til fulnar
At hetta nú aftur er ein rættur er prógv um, at tað loysir seg at stríðast og hava áræði.

**Føroya Tele**
03.11.08 var ein tungur dagur fyri starvsfólkini á Føroya Tele.
Útvið 10% av starvsfólkunum fingu uppsagnarskriv henda týsmorgun.
Orsøkin til hópuppsagnirnar vóru sambært leiðsluni serliga harðnandi kapping frá øðrum stórum veitara, ið komin inn á føroyska marknaðin, og at neyðugt var at laga fyritøkuna til broyttu tíðirnar.
Vit royndu, tað vit kundu at fyribyrgja og avmarka inntrivið og síðani eisini at tryggja limum okkara so lagaligar uppsagnartreytir sum tilbar.
Bæði tey, ið vórðu uppsøgd, eins væl og tey eftirverandi eru merkt av hesum uppsagnum og tað er okkara vón, at tit, ið mistu tykkara størv, framvegis hava áræðið og arbeiðsgleðina, og megna at síggja møguleikarnar og fáa gagnnýtt tykkara vitan og førleikar hjá øðrum arbeiðsgevarum.
Og eisini heittu vit á leiðsluna í Føroya Tele at tit vóru tey, ið áttu fyrstarttin, tá størv aftur skuldu setast. Hetta meina vit er ikki meira enn rímuligt, og við teirri vitan og royndum tit hava á økinum.

**Fasti gerðarrætturin**
Starvsmannafelagið fegnaðist almikið, tá tað umsíðir eydnaðist at fáa Fasta Gerðarrætin upp at standa. Gerðarrætturin er eitt gott dømi um eitt tætt og gott samstarv millum flest øll fakfeløg á arbeiðsmarknaðinum.
Vit hava gjørt nýtslu av rættinum nakrar ferðir og hava avgerðirnar bæði gingið okkum bæði við og ímóti. Lat okkum sláa fast, at sjálvt um vit ikki eru samd í øllum avgerðum hjá rættinum, so virða vit og taka avgerðirnar til eftirtektar.
Men vit halda at rætturin er kostnaðarmikil og at vit rinda ov nógv í m.ø. umsitingargjøldum. Ikki hevur verið gjørligt at fingið veruligt innlit í fíggjaliga partin.
Hann er á fíggjarlógini og undrar tað okkum, at tað skal vera so kostnaðarmikið at leggja mál fyri rættin.

**Almenna fakfelagssamstarvið**
Ein av størstu avbjóðingunum, sum vit og onnur fakfeløg á almenna økinum eru farin í holt við, er arbeiðið at fáa í lag eitt tættari og betri skipað samstarv.
Nógvar royndir hava verið gjørdar seinastu árini, men ongantíð hevur borið á mál. Tað eru ivaleyst nógvar orsøkir til tess. Samstarv er eitt lyklaorð og tað er alneyðugt, at vit fáa lagt lunnar undir eitt mennandi og berandi fakfelagssamstarv á almenna arbeiðsmarknaðinum.
Vit hava havt regluligt samskiftið í longri tíð og formansfundir hava verið eina ferð um mánaðin í útvið tvey ár.
Í fjør fóru vit saman undir at menna førleikar nevndarinnar og varð skeiðsætlan løgd. Skeið var í hølum okkara um ábyrgdir og skyldur hjá nevndum og rættarliga systemið.
Eisini vóru vit í Løgtingsskrivstovni og fingu innlit í skyldur løgtingsfólksins, nevndarbeiðið í løtinginum v.m. Í heyst var skeið á LO-Skúlanum, har undirvíst var í evnunum samráðingar teknikk /taktikk og psykologi í samráðingum. Í februar var umboð frá LO-skúlanum í Føroyum og helt skeið í "Prosesstýring", har feløgini saman gjørdu virðisgrundarlag fyri einum komandi samstarvi felaganna millum.

Saman hava vit eisini verið á fundum við Lønardeildina í Fíggjarmálaráðnum um ásetingina at endurskoða lønarspurningin. Nærri um hetta á aðalfundinum
Og tá málið um Topaz kom á breddan í fjør, fóru vit í felag á fund við leiðslu og nevndina fyri LÍV og tá fekk manningin tað hon átti til góðar. Nú eru vit so aftur í somu ólukkuligu støðu og tað tykist sum hendir okkurt í hesi løtu, hetta verður skrivað.
Vit feløg ætla, at samstarvið skal økjast og skipast og koma vit nærri inn á hetta á aðalfundinum.

**Almenna eftirlønin**
Enn bíða vit eftir nýggju almennu eftirlønarskipanini. Hvussu ofta hetta hevur drigið út, er torført at fáa greiðu á og tað er alneyðugt at fáa greiðu á hesum máli nú.
Tað eru mong, ið enn ikki hava nøktandi skipnir og tað er neyðugt at viðurskiftini koma í rættlag - ongantíð ov skjótt.
Vit koma uppá 15% í heyst og kunnu gleðast um tað. Tað var eitt rætt val at leggja nógv fyri og fáa gjørt hetta hálið yvir stutta tíð.

Øll eiga at gera sær greitt, at longri tíð, ið gongur, áðrenn nakað hendir, vónleysari gerst støðan hjá teimum, sum skulu fáa ágóðan av einari nýggjari eftirlønarskipan. Tað er ein sannroynd, at skal ein eftirlønarskipan virka til fulnar, so hendir hetta ikki frá degi til dags - tað gongur long tíð.
Vit kenna tað jú frá okkara egnu skipan.

**ALS**
Fakfeløgini eru samd um, at vit vara av ALS og vilja stríðast fyri at hetta framhaldandi verður so.
Uppskotið frá ALS-stýrinum, um at settur verður á stovn arbeiðsmarknaðardepil, sum skal hýsa øllum teimum økjum, sum vara av og taka sær av arbeiðsmarknaðarmálum, er skilagott.
Hetta taka vit fult og heilt undir við, ikki minst út frá tí grundgeving, at arbeiðsmarknaðurin her kann skapa eitt týdningarmikið felagsforum, sum vit uttan iva hava tørv á.
Samstundis er slíkur depil eitt amboð at halda umsitingarkostnaðin á so lágum støði, sum gjørligt.
Uppskot um broytingar í skipanini eru til umrøðu hjá feløgunum í hesi løtu og verður komi nærri inn á málið á aðalfundinum.

**Barsilskipanin**
Eisini barsilsskipanin hevur verið á breddanum.
Starvsmannafelagið tekur sjálvandi undir við at tíðarskeiðið er longt og eigur tað at vera ein spurningur sum foreldrini sjálvi eiga at avgera hvussu hetta verður nýtt. Hetta er eisini ein spurningur um at stuðla undir eitt reelt javnstøðumál.
Vit hava fleiri ferðir gjørt vart við og lagt áherðslu á, at fáa rætta skeivleikan, soleiðis at skipanin eisini skal gjalda eftirlønargjaldið hjá teimum, sum fáa úr skipanini. Í dag rindar skipanin ikki gjaldið, sum arbeiðsgevarin sambært sáttmálan skal rinda og er lønin tí í veruleikanum lægri í teirri tíðini ein er í barsilsskipanini.
Og hetta er eitt vandamál, ið serliga rakar kvinnurnar, tí her restar nógvur peningur í, tá eftirlønin skal útgjaldast. Hetta má og skal broytast.

**Umhvørvið**

Álitið “Skjótt syftir seiður og tunga takið” sum ein verkætlanbólkur mannaður við fólki úr almennu umsitingini, hevur gjørt, vísir á tiltøk, sum uppá stutt og langt sikt kunnu minka um útlátið, sum verður neyðugt skulu vit lúka krøvini í nýggju avtaluni, sum væntandi verður samtykt á ST-veðurlagsráðstevnuni í Keypmannahavn í december 2009.

Verja av umhvørvinum er ein skylda við sum menniskju hava, og eisini her skulu vit sum felag hava eina konkreta ætlan, hvussu vit kunnu og eiga at verða virkin. Á NTR-ráðstevnuni í Føroyum í august og á NSO ráðstevnuni í Finnlandi er hetta eitt av evnunum, og fer Starvsmannafelagið eisini at hava sítt boð uppá, hvussu vit sum felag kunnu verða við at røkka málinum at minka um útlátið, tað snýr seg um ein hugburðsbroyting.
Hetta er umráðandi og grundarlagið undir, at vit ikki bert kunnu gleðast um, at vit hava eitt gott samfelag at búleikast í nú, men at vit eisini kunnu lata hendan førningin til eftirkomarar okkara..

**Altjóðagerðin**

Vit eru partur av heiminum og hóast smá, so hava vit skyldu at taka lut og taka ábyrgd av viðurskiftum, ið hava okkara allra áhuga.
Tað skerst ikki burtur, at vit, á hesum og øðrum økjum, sum hava við altjóða avgerðarrætt at gera, mugu skapa og fáa okkum størri avgerðarrætt sjálvi og ikki bert knýta okkum at donskum lógum og avgerðum, sum mangan heldur ikki hava somu áhugamál, sum vit. Útlendingaspurningurin er eitt gott dømi um, at vit mugu hava okkara egna avgerðarrætt og fingu vit í fjør eina serorðing viðvíkjandi arbeiðsviðurskiftum.
Tað eru so nógv aspekt í tí at vera partur av heildini, og er umhvørvisspurningurin, ið er nevndur áður, ein týðandi táttur og stór ábyrgd, ið vitmugu taka í álvara.
Hetta var eisini evnið á NTR ráðstevnuni í Svendborg í juni mánaði og er umrøtt í einum Starvsblaðið í fjør.
Vit mugu gerast aktivur partur í hesum arbeiði og gera okkara ávirkan galdandi – í fakfelagshøpi eins væl og í ávirkanini mótvegis politiska myndugleikanum.

**Portørsáttmálin**
Nú er greitt at galdandi sáttmáli hjá portørunum gongur út 01.04.09
Flestu portørarnir tóku avgerð um at fara úr Havnar Arbeiðsmannafelag og gerast limir í Starvsmannafelagnum og tá varð greitt, at hetta kundi gerast tungur burður at fáa í verðina.
Vit vóna at málið verður loyst í sátt og semju, við virðing fyri tí, ið starvsfólkini á Sjúkraflutningstæanstuni til eina og hvørja tíð sjálvi ynskja.

**Álitisfólkaval**
Í heyst verður álitisfólkaval aftur.
Í fjør vóru nývaldu álitisfólkini á grundskeiðunum 1 og 2.
Eins og áður vóru hesi internatskeið og hildin á Gjáargarði. Talið av nývaldum var ikki so stórt, sum tað ofta hevur verið áður - umleið 25%. Harafturat komu so álitisfólkini innan Postverkið.
Afturboðanirnar hava verið jaligar og tað fegnast vit um.
Vit leggja alstóran dent á og orku í at menna álitisfólkaskipanina.
Álitisfólkini, ið hava tænt felagnum í fleiri ár, hava saknað, at nakað verður skipað til teirra eisini, og taka vit hetta avgjørt til eftirtektar.
Tit fáa kunning um nær hesi skeið koma á breddan, tí skeið fara vit at halda.

**Bygnaðarbroytingar**
Vit hava áður verið inni á, at neyðugt er at skipa felagið betri innanhýsis.
Álitisfólkafundur var í juni mánaði, har evnið var til umrøðu.
Longri tíð hevur gingið enn ætlað at veruliga fara í holt við støðuna, og nú hava vit avgjørt, hvussu vit nevndarliga og umsitingarliga skipa okkum í mun til arbeiðið. Vit ætla at heita á nøkur álitisfólk at vera við í einum minni arbeiðsbólki og so at hava ein fylgibólk av álitisfólkum at ráðføra okkum við.
Nærri um hetta á aðalfundinum.

**Lærlingaráðið**
Í 2007 samtykti nevndin í Starvsmannafelagnum at skipa eitt lærlingaráð innan felagið. Hetta fyri at teir lærlingar, sum eru limir í felagnum, sjálvir hava ein pall at viðgera tey viðurskifti, sum hava teirra serliga áhuga - tað verið seg fakliga eins væl og fakfelagsliga.
Harafturat gevur hetta lærlingum ein møguleika at koma saman til ymisk tiltøk.

Lærlingaráðið hevur nú virkað í útvið 2 ár og má sigast, at tey hava tikið avbjóðingina í álvara og fingið væl av skafti. Tey eiga egnan teig inni í Starvsblaðnum, sum tey hava ábyrgdina av.
Tey hava verið við á ráðstevnum og fara í heyst at skipa fyri lærlingadegi fyri allar áhugaðar lærlingar.
Tað vildi verið gott um hetta átakið kundi verið við at skapt eina enn breiðari skipan fyri allar lærlingar - eisini innan onnur sáttmálaøki.
Vit takka teimum fyri teirra ídnið og ynskja teimum framhaldandi góða eydnu og tey hava okkara fulla stuðul.

**Starvsblaðið - heimasíðan.**
Starvsblaðið er ein týðandi partur av kunningini frá felagnum.
Avgjørt er nú, at blaðið kemur út eina ferð um ársfjórðingin. Tað hevur víst seg, at ætlingin at geva blaðið út seks ferðir um árið, hevur verið torfør at hildið og hava vit tí valt at broytt hetta. Framvegis er málið at innihaldið verður so viðkomandi og upplýsandi sum gjørligt. Eftir okkara meting hevur hetta eydnast rímiliga væl.
Rit og Ráð við Torfinni Smith er ein góður samstarvsfelagi í hesum arbeiði.
At hava eina virkna og viðkomandi heimasíðu, er ein týðandi táttur í kunningararbeiðnum hjá einum hvørjum og sjálvandi eisini hjá okkum.
Her ætla vit at fremja broytingar, so sjálv heimasíðan gerst virknari og fleiri tíðindir og greinar verða løgd út á hana.

**Felagshúsini**
Hølini í J.H. Schrøtersgøtu mugu sigast at hava livað upp til endamálið, at verða ein aktivitetsdepil fyri limirnar og annars í umhvørvinum sum heild. Her er sera nógv virksemi - frá felagsfundum til brúdleyp og barnadóp. Vit fegnast um hendan stóra áhugan at nýta snotuligu hølini.
Hurðarnar inn í glassstovuna og út í deiliga garðin fara at verða breiðkaðar, soleiðis at betri møguleikar verða hjá rørslutarnaðum at nýta hølini.
Í fjør vóru húsini eisini málað innan og ovara hæddini varð fríðkað.
Økið eystanfyri er liðugt, og nú kunnu vit øll njóta garðin, sum er snøggur og væl steinsettur og plantaður. Hølini og útiøkið hanga væl saman og fólk, ið ikki kenna hús okkara, gerast bilsin, tí tey ikki væntaðu at finna slíka oasu, sum glassstovan og garðurin eru.
Samanumtikið kunnu vit siga, at vit við felagshølunum hava eitt sera gott aktiv í felagsarbeiðinum.

Í samband við at Postfelagið og Starvsmannafelagið løgdu saman, kom eisini felagshúsið hjá Postfelagnum yvir í felagsognina. Stórur partur av húsinum er í dag leigaður út, men ovastu hæddina hevur Postfelagið nýtt, meðan samanleggingin er farin fram. Ongin ivi er um, at vit her eiga eina virðismikla ogn, sum kann koma okkum til góðar í virksemi felagsins í framtíðini.

**Summarhús**
At fremsta uppgávan hjá einum fakfelagi er, at fáa limunum so góðar og tryggar umstøður sum gjørligt, eigur ongin ivi at vera um.
Men at verða virkin á øðrum økjum eisini, soleiðis at limirnir veruliga merkja at teir eru í einum góðum felgasskapi, meta vit eisini eigur at vera uppgávan hjá einum fakfelagi.
Aftur í ár ber til hjá limum Starvsmannafelagsins at leiga summarhúsini við Gjógv. Limirnir tóku væl ímóti tilboðnum í fjør og hava vit tí aftur í ár gjørt avtalu við eigararnar.

Talan er um eini gomul og hugnalig sethús við Gjógv, í Stólpa, sum limirnir kunnu leiga frá felagnum fyri ein lagaligan kostnað. Limirnir rinda kr. 300,- fyri døgnið og um onnur leiga tey, rinda hesi kr. 600,-
Á heimasíðu felagsins kunnu áhugað síggja nær húsið er tøkt at leiga, og so er bert at boða umsitingini frá sínum leiguynski.

Nú er grundøkið, sum Postfelagið átti í Skálavík, planerað og ætla vit at byggja summarhúsini skjótast tilber. Vit fingu tilboð uppá bygging í fjør, men mettu tað vera ov kostnaðarmikið og tað vísir seg nú skilagott, at vit valdu at bíða eina tíð. Húsini verða bygd í einari hædd, so tað eisini er lætt at koma til hjá rørslutarnaðum. Tey verða umleið 80 fermetrar til støddar.
Eins og við húsunum við Gjógv, er endamálið við húsunum í Skálavík, at hesi skulu standa limunum í boði at leiga.

**Dansk Folkeferie**
Fyri nøkrum árum síðani gjørdi Starvsmannafelagið eina avtalu við Folkeferie í Danmark, soleiðis at limir felagsins kundu fáa avsláttur í teirra ferðatilboðum í Danmark og aðrastaðni. Hesi tilboð hava havt rættiliga stóran áhuga millum limirnar, og vit kunnu bert minna á, at hesi tilboð framvegis eru galdandi. Meira er at lesa um tey mongu ferðatilboðini á: www.folkeferie.dk/smf

**Tilboð frá fyritøkum til limir okkara**
Vit hava arbeitt at útvega limum góð tilboð, eins og vit kenna tað frá øðrum londum.
Vit settu okkum í samband við stórt tal av handlum, virkjum, matsstovum o.ø. og spurt um vit ikki skulu fara inn í eitt samstarv, har báðir partar fáa nakað burturúr. Vit við okkara limaskara kunnu ávirka at benda hesi til tær fyritøkur, sum so aftufyri, vilja geva avsláttur i prísi til limirnar.
Vit hava fingið fleiri avtalur í hús og eru hesar at síggja á heimasíðu okkara.
Vit vita, at fleiri hava brúkt henda møgulleikan at faa avsláttur av vørum og tænastum og hetta er lætt og ómakaleyst. Tú vísir bara fram limakortið, tá rindast skal.
Nøkur hava vent sær til okkara, tí tey ikki hava funnið ella fingið limakortið, og tað eru tit sjálvandi meira enn vælkomin at gera.

**Norðurlendskt og altjóða samstarv**
Starvsmannafelagið er limur í altjóða fakfelagsskapinum ISKA (Internationalen for Stats- och Kommunalanstallda), sum hevur uml. 20 mill. limir innan 640 fakfelaøg í 160 londum runt allan heimin. Bæði formaður og aðalskrivari í felagskapinum eru nú norðurlendingar, ávikavist svenska Ylva Thørn og danin Peter Waldoff, formaður í HK/STAT.
Sum áður kunnað um, so eru vit í norðurlendskum høpi limir í trimum felagsskapum, umframt einum "tvørgangandi."
SUN (Service- och tjenestebranschens Union i Norden), fyrsta norðurlendska samstarv okkar, áður kallað DNF - Den nordiske funktionærsammenslutning, sum vit aktivt taka lut í og har forkvinnan hevur sætið í stýrinum. Vit møta til tey tiltøk, sum eru á skránni hjá felagsskapinum og í juni mánaða í fjør var bransjufundur herheima, har pensiónsmál og tryggingar vóru til umrøðu.
Felagsskapurin er uppbygdur uttanum serlig arbeiðsumráði/bransjur. Leggjast kann aftura, at Havnar Arbeiðskvinnufelg eisini er við í SUN og á reingerðarumráðnum.

Í NTR (Nordisk Tjenestemands Råd) hava vit eisini umboðan og sita í stýrinum.
Hesin felagsskapur umboðar fólk fyrst og fremst í kommunalum størvum. Felagsskapurin heldur í 2009 árligu ráðstevnuna í Føroyum, og fáa vit útvið 100 gestir. Vit hava samstundis havt

formannskapin síðani í fjør summar, og til ráðstevnan er av. Londini skiftast um at hava formansskapiní og í eitt ár í senn.
Nevndin í Starvsmannafelagnum hevur skipað seg soleiðis, at næstformaðurin, hevur høvuðsábyrgdina av umboðan okkara í NTR. Hann er formaður fyri NTR, árið vit nú hava formansskapin.

2007 gjørdust vit limur í NSO (Nordiske Statstjenestemenns Organisation) og eru somuleiðis umboðað í hesum stýri.
Eisini í NSO hava londini formansskapin eitt ár í senn og eftir árligu ráðstevnuna, sum verður í Finnlandi í august, eru tað vit, ið eiga formansskapin í eitt ár og verður forkvinnan, tá eisini forkvinna fyri NSO.

NOFS, sum er norðurlenska parturin/deildin av EPSU og ISKA eiga vit eisini luttøku í, í kraft av okkara limaskapi í NTR og NSO

**NTR ráðstevnan í summar**
Sum nevnt, so ganga ráðstevnurnar og formannsskapurin á skift millum londini, eitt ár hvørt landið.
Ráðstevnan í ár verður í Føroyum dagarnar 19. til 23. august 2009, nú Starvsmannafelagið hevur formansskapin.
Hetta setir krøv til okkara at samskipa og skipa fyri stóru ráðstevnuni, ið fer at varpa ljós á búskaparstøðuna og eisini umhvørvisspurningin, nú alheimsráðstevna verður í Keypmannahavn í ár, undir svenska EU formansskapinum.